UTTAN ÚR HEIMI

# Ein tann ringasta ódnin nakrantíð



*Amerikanarar flýggja aftur undan einari tropiskari ódn, sum kann gerast tann ringasta nakrantíð*

**Ódnin "Rita" er ein tann harðasta, sum fólk vita um at siga, og meiri enn ein millión fólk eru flýdd undan henni**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tropiska ódnin "Rita" versnar altsamt. Í gjár flokkaðu amerikonsku veðurmenninir hana í flokki fimm, sum er tann ringasti. Tá var vindferðin í ódnini var upp í 265 kilometrar um tíman ella meiri enn 70 metrar um sekundið, og kanningarnar bendu á, at vindurin bara vaks.

Samstundis var greitt, at "Rita" fer at hava øðiligt avfall við sær, tá hon kemur inn yvir land. Metingarnar siga, at avfallið verður um 300 millimetrar, men tað kann væl henda, at tað verður meiri enn so. Amerikanski ódnarstovnurin ávarar eisini um, at alduhættin við strondina verður um 10 metrar í meðal, og at tað lága trýstið fer at gera, at sjógvurin verður fleiri metrar oman fyri tað vanliga.

Framrokningarnar vísa, at "Rita" fer í land í landssynningspartinum av statinum Texas, ímillum býirnar Brownsville og Houston, og helst verður tað býurin Corpus Christi, sum fer at standa fyri skotum fyrst. Tað verður ætlandi eina ferð í nátt, og haðani breiðir ódnarveðrið seg inn yvir land í morgin.

### Undantaksstøða

Myndugleikarnir í Texas hava fyrireikað fólkið til ódnina, og teir hava givið teimum, sum búgva fram við strondini, boð um at fara haðani. Í gjár var ferðslan sera tøtt á vegunum norðureftir, og hildið verður, at meiri enn ein millión hava gjørt eftir áheitanini um at rýma.

George W. Bush, forseti, sum sjálvur er úr Texas, lýsti gjáramorgunin statirnar Texas og Louisiana í undantaksstøðu. Kunngerðin frá forsetanum kom, stutt eftir at veðurstovan hevði boðað frá, hvørji øki eru í serliga stórum vanda. Eitt teirra er býurin Galveston í Texas, sum fór sera illa av einari ódn í 1900. Næstan 12.000 fólk doyðu ta ferðina, og hetta er tann ringasta náttúruvanlukkan í USA nakrantíð.

Tað verður ikki hildið, at "Rita" fer at raka Louisiana líka meint, sum "Katrina" gjørdi fyri fýra vikum síðani, men vandi er kortini á ferð har, tí nógvastaðni eru menn ikki lidnir at umvæla skaðarnar, sum hendu tá. Tí hava myndugleikarnir í New Orleans biðið fólk fara úr býnum.

# Politisk spreinging á veg í Ísrael

**Afturtøkan úr Gazageiranum hevur elvt til eina uppgerð í Likud-flokkinum hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sunnudagin fæst kanska at vita, hvør er tann sterki maðurin í ísraelska stjórnarflokkinum, Ariel Sharon, forsætisráðharri, ella fyrrverandi forsætisráðharrin Benyamin Netanyahu.

Í apríl næsta ár verður val til ísraelska tjóðartingið, men longu sunnudagin skal Likud taka støðu til, hvør av teimum báðum skal mynda flokkin hetta til valið. Úrslitið fer at vísa, hvør er tann sterki maðurin, skrivar Jerusalem Post.

Benyamin Netanyahu var fíggjarmálaráðharri, men tá stjórnin samtykti at flyta jødisku niðursetufólkini úr Gaza og at taka herin haðani, fór hann frá fyri at mótmæla avgerðini. Hann fær stuðul frá høgravonginum í Likud, og hann hevur boðað frá, at hann ætlar sær at royna at fella Sharon. Netanyahu hevur eisini kravt, at valið verður framskundað til í heyst.

Politiskir eygleiðarar í Ísrael siga, at tað kann væl vera, at Sharon vinnur á Netanyahu sunnudagin, men at tað kortini verður Netanyahu, sum verður forsætisráðharraevni hjá flokkinum. Tann stóri spurningurin er, um taparin sunnudagin fer at stovna sín egna flokk. Hendir tað, er tað einki minni enn ein politisk spreinging, siga eygleiðararnir.

## Vilja ikki eta

Fýra menn úr Kuwait, sum eru í amerikonsku fangaleguni í Guantanamo, eru farnir í hungursverkfall.

Verjarnir hjá teimum fýra fangunum siga, at menninir ætla sær at halda fram við hungursverkfallinum, til teir sleppa úr leguni. Teir krevja eisini at koma fyri rættin, so teir kunnu sleppa at verja seg. Sakførarar teirra siga við AP, at menninir eru sera illa fyri, og at amerikanararnir hava gjørt av at tvingsilsfóðra tveir teirra, tí annars er vandi fyri, at teir doyggja.

Tað eru ikki bara teir fýra kuwaitararnir, sum sýta fyri at eta. Uppruna fóru 131 fangar í hungursverkfall, men nú eru 36 eftir, sigur ein talsmaður hjá fangaleguni í Guantanamo, sum hýsir umleið 500 monnum, sum eru undir illgruna fyri at hava samband við yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda.

## Fann gamla hópgrøv

Ein maður hevur funnið leivdir av beinagrindum í jørðini nærhendis einum flogvølli uttan fyri týska býin Stuttgart.

Týsku myndugleikarnir siga, at talan er um beinagrindir av fólki, og hildið verður fyri vist, at talan er um leivdirnar av jødiskum tvingsilsarbeiðarum, sum vórðu jarðaðir her undir seinna heimsbardaga. Tað er ikki greitt, hvussu mong liggja jarðað her, men fyribilskanningar benda á, at talan er um minst tíggju fólk, skrivar blaðið Spiegel.

Hópgrøvin varð funnin, tá menn skuldu leingja ein flogvøll við Stuttgart, men nú er arbeiðið steðgað, tí serfrøðingar skulu kanna hópgrøvina og økið har um vegir.

## Vatntrot í Beijing

Stórir partar av Kina hava ov lítið vatn, og eina ringast stendur til í sjálvum høvuðsstaðnum Beijing.

Teir umleið 15 milliónir Beijing-búgvarnir brúka 750 milliónir rúmmetrar av vatni um árið. Upprunaliga hevði býurin 16 stórar vatngoymslur, men tær flestu eru tornaðar upp ella so illa dálkaðar, at nú eru bara tvær eftir. Tað ger, at fólk mugu fáa vatn úr undirgrundini. Men heldur ikki har er nóg mikið av vatni, og tí noyðast myndugleikarnir at grava longri og longri niður fyri at fáa fatur á vatni, skrivar AP.

Tað er ikki bara í Beijing, at trot er á vatni, og tí arbeiða kinesisku myndugleikarnir við nøkrum risastórum verkætlanum, sum skulu tryggja fólkinum nóg mikið av vatni. Einastaðni eru teir í ferð við at gera eina byrging, sum verður tann størsta í heiminum, og sum skal útvega bæði vatn og elorku. Aðrastaðni eru teir í ferð við at grava langar veitir.

Men tað er kostnaðarmikið at útvega teiumum nógvu kinesarunum vatn. Heimsbankin sigur, at minst 400 av teimum 669 stóru býunum hava ov lítið vatn, og at tað fer at kosta einar 600 milliardir krónur at útvega teimum nóg mikið av vatni. At høvuðsstaðurin er serliga meint raktur kemst fyrst og fremst av, at býurin er vaksin sera nógv, og framburðurin í samfelagnum hevur eisini havt við sær, at fólk brúka nógv meiri vatn nú enn fyrr.

## Onga neyð

Svenski forsætisráðharrin, Göran Persson, fer ikki at líða nakra neyð, tá hann ein dagin ger av at taka seg burtur úr politikki.

Persson hevur verið forsætisráðharri í næstan tíggju ár, og frammanundan var hann skúla- og fíggjarmálaráðharri í næstan fýra ár. Tað ger, at hann fær 116.000 krónur í pensjón um mánaðin tað fyrsta árið, eftir at hann fer frá og síðani 56.000 krónur um mánaðin á hvørjum ári. Tað merkir, at livir hann, til hann verður 80, fær hann 16 milliónir krónur í pensjón í nútíðar krónuvirði, skrivar Aftonbladet.

Kona Person, Anitra Steen, er heldur ikki fyri ongum, tá tað snýr seg um pensjón. Áðrenn hon gjørdist stjóri í svensku rúsdrekkasøluni, var hon ríkisskrivari og aðalstjóri í skattstýrinum. Aftonbladet skrivar, at hetta fer at geva henni 24 milliónir krónur í pensjón, um hon livir, til hon verður 80.

Sostatt fáa tey bæði 40 milliónir krónur, um tey liva so leingi, og tá eru møguligar privatar pensjónsskipanir ikki taldar við.